

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 01 - 2013

# Nú síggja danir møguleikarnar í Grønlandi

At danskar fyritøkur hava fingið eyguni upp fyrt teimum stóru møguleikunum í ráevnisvinnuni í Grønlandi sást týðiliga, tá danska ídnaðarfelagið og grønlendska arbeiðsgevarafelagið skipaðu fyri einari ráðstevnu í Keymannahavn í gjár, tá ráðstevnan var sera væl vitjað. Í danska ídnaðarfelagnum vóna tey, at ráðstevnan fer at leggja lunnar undir spírandi samarbeiði millum tær donsku og tær grønlendsku fyritøkurnar, sum vóru á ráðstevnuni. -Vit hava varnast ein veksandi áhuga fyri tí, sum hendir innan ráevnisøkið í Grønlandi. Vit eru sannførd um, at danskar fyritøkur hava nakrar førleikar, sum kunnu koma til góðar í hesum sambandi, og at samstarv millum danskar og grønlendskar fyritøkur kann vera ein góð loysn, tá tað snýr seg um at virka sum undirveitarar í komandi verkætlanum í Grønlandi. Tað sigur stjórin í Dansk Industri, Thomas Bustrup, við grønlendska kringvarpið. Hann ásannar, at nógvar danskar fyritøkur hava ikki rættiliga sæð, hvørjir møguleikar eru í verkætlanum í Grønlandi, men vónar, at hesar fáa eyguni upp fyri teimum nú. Ein av teimum donsku fyritøkunum, sum hevur verið virkin í Grønlandi í mong ár, er MT Højgaard. -Vit hava verið í Grønlandi í eini 50 ár, og vit hava eisini drúgvar royndir innan námsvinnuna. Nú duga vit at síggja ein møguleika fyri, at danskar, grønlendskar og altjóða fyritøkur kunnu forvinna nakað av pengum í Grønlandi, sigur Nikolaj Brandt hjá MT Højgaard við KNR.